# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Eitt tjúgu ára minni

Tað eru í hesum døgum liðin tjúgu ár síðan Berlinmúrurin fall og Kalda kríggið endaði. Við rapaða múrinum gjørdist heimurin ein annar. Eitt tíðarskeið, har eystur og vestur, Warzawasamgonga og NATO, stóðu hvørt móti øðrum, var av og eitt heilt nýtt tíðarskeið í søguni byrjaði. Bakstøðið fyri falli múrsins var alt tað, sum var hent í Sovjet eftir, at Gorbatjov varð komin til ræðið í tí størsta og sterkasta ríkinum í Warzawasamgonguni.

Við sínum nýggja politikki við *glasnost* og *perestroika* broytti Gorbatjov stívnaðu og ódemokratisku politisku skipanina í Sovjetsamveldinum. Men hesar stóru politisku og bygnaðarligu broytingar komu sjálvsagt ikki bert frá einum einstøkum politiskum leiðara. Broytingarnar stavaðu eisini frá nógvum ymiskum viðurskiftum og nýggjum rákum eins væl í Sovjetsamfelagnum og tess vasalstatum í eystureuropa og í heiminum sum heild.

Politisku broytingarnar í Sovjet breiddu seg til onnur lond í Warzawasamgonguni og sostatt eisini til DDR, sum var ein hin mest loyali stuðul Sovjets í samgonguni. Misnøgdin í vanliga fólkinum var stór og orsøkirnar til hesa misnøgd vóru nógvar: demokratiskt hall, manglandi persónligt frælsi, vørutrot og ein sannkensla av, at DDR borgarar ikki vóru harrar í egnum landi. Vesturberlin var vorðin eitt slag av vestligum sýnisglugga inni í DDR og eysturblokkinum. Býurin var eitt Mekka fyri ta brúkaramentan, ið eyðkennir vesturheimin, samstundis sum býurin var eitt demokratiskt oasa í hjartanum á DDR, har ráðandi politiski flokkurin SED mestsum hevði einarætt til politiska valdið. Almenna eftirlitið við borgarunum í DDR var neyvt og loynipolitiið, Stasi, var ein tann størsti almenni arbeiðsgevarin.

Tolið hjá vanligu DDR borgarunum í Berlin var uppi og demokratiska rákið í øðrum eystureuropiskum londum var loksins komið til DDR, har serstakliga fólkið í Berlin misti tolið við treka og ódemokratiska stýrinum hjá ráðandi eindarflokkinum SED. Leiðararnir boygdu seg og lótu portrini múrinum upp. Teir valdu hermegina frá og bjargaðu soleiðis Eysturtýsklandi frá einum blóðugum samanbresti millum hermegina og borgarnar.

Múrurin var upprunaliga reistur ikki fyri at verja Eysturberlin móti eini møguligari innrás vestaneftir, men fyri at halda DDR borgarum stongdum inni í egnum landi. Tað var so nógv vælútbúgvið fólk rýmt vesturum, at Ulbricht, sum var fyrsti leiðari DDR, gjørdi av at steðga fráflytingini við einum høgum betongmúri. Hesin múrur gjørdist ein ímynd um einaræði og kúgan í einum Europa, sum fyri tað mesta kundi kallast demokratiskt. Rapaði múrurin gjørdist byrjanin til endan á tí dapra tíðarskeiði, ið vit nevna Kalda kríggið. Tað eru tí allar góðar grundir at minnast hesa hending, sum vendi upp og niður á Europa. Hendingin elvdi eisini til samanleggingina av DDR og BDR, ein avleiðing, sum ikki hóvaði øllum europearum væl. Minnini um eitt sterkt og sameint Týskland vóru jú ikki bara góð. Men væl hevur roynst kortini, og nýggja sameinda Týskland má sigast at hava staðið demokratisku royndina.

**Sosialurin**

## Um at skriva rokningar

EDMUND JOENSEN
løgtings- og fólkatingsmaður



Í hesum døgum verða rokningar skrivaðar út. Beinleiðis orsøkin er, politikarar hava skorið í almennum inntøkum og samstundis vaksið um útreiðslurnar. Botnurin í landskassanum dagar undan, og rokningarnar enda hjá teimum, sum onki eiga í teimum.

Smakkurin man vera beiskur í munninum á teimum, sum í hesum døgum standa til at fáa rokning sendandi frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum.

Eitt er, at skattgjaldarar, ið munnu hava hampilig ráð til at gjalda, fáa eina rokning á seg, nú skatturin hjá teimum skal upp. Harmiligt er tað, um enn tað ikki er heimsins undirgangur.

**Knokkroyta pensjónistar**

Tað, sum kortini býðir ímóti, er, at rokning fer til slík, sum í grundini als onki eiga í henni.

Tak til dømis landsins pensjónistar. Ein av veiku bólkunum.

Hugsa tær støðuna. Tú hevur strevað og rindað fyri teg í eitt langt lív, og nú kemur takkarlønin frá tí almenna: inntøkumøguleikarnir skulu í kvørnina hjá TAKS. Og stuðulin til heilivág – mangan er hann lívsneyðugur – er skerdur ella heilt tikin burtur.

Smakkurin man vera beiskur.

**Hvørvur vælferðarsamfelagið?**

Longu frammanundan er gerandisdagurin hjá pensjónistum merktur av, at almennar tænastur eru vánaligar.

Her er ein partur av syrgiliga listanum:

- Telefonin hjá kommunulæknanum svarar sjáldan
- Sjúkrahúsini taka sær bert av tí mest akutta
- Útborni maturin er vorðin dýrari men neyvan betri
- Heimahjálpin er illa sperd og hevur ringar stundir til eitt prát
- Nógvastaðni er trupult at fáa pláss á røktarheimi

Er tað løgið, at júst gomul í Føroyum hyggja langt eftir vælferðarsamfelagnum? Hvagar fór tað?

**Kø við Kassa 1**

Yviri við Kassa 1 stendur eisini ein partur av vinnulívinum.

Alifyritøkur skulu bráðliga rinda fyri hvønn millimetur, tær virka á.

Og fíggjarvinnan hevur fingið boð um at avlevera 10 kr. í landskassanum, hvørja ferð hon rindar starvsfólkum sínum 100 kr. í løn.

Hesar báðar vinnugreinar eru tiknar tilvildarliga burturúr, og nú skulu tær rinda.

Tann, ið rokningina skrivar, tekur sær ikki av, at vinnukarmarnir eru óstabilir. Og hann gloymir tilvitað tørvin, sum flestar vinnufyritøkur í dag hava fyri pengum til konsolidering og at menna seg til at taka við framtíðar avbjóðingum.

**Stóra svarta holið**

Øll síggja, at her er talan um tilvildarligan avgjaldspolitikk, ið borgarar og fyritøkur hvørki kunnu liva við ella undir.

Flestu munnu eisini síggja, at rokningarnar verða sendar teimum, sum ikki eiga lut í teimum.

Hvør er so orsøkin til, at rokningar koma kortini?

Ja, ítøkiliga orsøkin er, at botnurin í landskassanum er farin at daga undan.

Fleiri siga, at tað er fíggjar- og búskaparkreppan, ið rakar so hart. Onnur at fiskiskapurin er so ringur og prísirnir lágir. Og at lønirnar eru hækkaðar.

Hetta er tó ikki veruliga orsøkin.

**Veruliga orsøkin**

Trupulleikin er, at vit í Føroyum – undir skiftandi landsstýrum – ikki hava dugað at húsast og stýrt búskapinum.

Hóast vit hava riðið á búskaparligum aldutoppum, ið aldri hava verið hægri, so er búskapurin vanstýrdur.

Ímóti allari fornuft eru inntøkur landskassans skerdar. Eitt nú hava politikarar – teir við Misskiltari Nationalismu í skjaldramerkinum – lagt seg eftir at skerja Ríkisveitingina. Harvið er okkara mest stabila inntøka avmarkað.

Skattalættar eru eisini givnir út í tíðum, har skilabetri hevði verið at sett fótin á bremsuna og sett pening á bók.

Samstundis eru útreiðslurnar á fíggjarlógini næstan tvífaldaðar seinastu 10 árini.

Stutt sagt: Skarvað er av inntøkunum, og økt er um útreiðslurnar.

Øll munnu síggja, at fyrr ella seinni verður gjógvin millum inntøkur og útreiðslur so djúp, at endarnir slitna. Henda gongd er dømd til at miseydnast.

**Galskapurin heldur fram**

Hóast øll síggja trupulleikan, og hóast rokningarnar til teirra, ið onki eiga í teimum, skjótt fara í postkassan, heldur galskapurin fram.

Framvegis situr vaksið fólk í Landsstýrinum og í Løgtinginum og tvíheldur um, at tryggu inntøkurnar mugu ikki vaksa. T.d. vildi formaðurin í Javnaðarflokkinum ikki taka stig til at lata Ríkisveitingina prístalsregulera aftur, hóast hann hevði møguleikan.

Og enn sita politikarar í ramum álvara og verja sjónarmiðið um, at vit skulu gera ovurstórar íløgur í tunlar. T.d. sterki maðurin í Fólkaflokkinum, sum er formaður í Fíggjarnevndini.

Alt meðan tey í Fíggjarmálaráðnum sita og sleikja frímerkir at seta á rokningarnar, viknar vælferðarsamfelagið, vinnufyritøkur verða brandskattaðar, og inntøkuskattaskrúvan verður snarað nøkur umfør.

Álvaratos, her ruggar ikki rætt.

Minst til at hava taldan pening kláran, tá rokningin kemur. Hon verður borin út nakað eftir nýggjár.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.